# Schuster upp á tal í Onglandi

Týski venjarin Bernd Schuster var í farnu viku sagdur úr starvinum í Real Madrid, og nú kann tað verða, at hann endar í Onglandi. Sunderland leitar eftir nýggjum venjara, eftir at Roy Keane gavst í starvinum, og Schuster skal verða ein møguleiki. Men hann stendur á einum langum lista. Sunday Telegraph skrivar, at Sunderland hevur skrivað sær 30 møguligar venjarar niður.



# Nedved eitt ár afturat

36 ára gamli kekkiski miðvallarspælarin Pavel Nedved umhugsar at taka eitt ár afturat í italska felagnum Juventus. Sáttmálin millum Nedved og Juventus gongur út í summar.- Mánadag eftir ein dyst, við øllum bláu merkjunum, sigur hann, at hann fer at gevast. Týsdag umhugsar hann støðuna, og mikudagin er hann til reiðar at skriva undir nýggjan sáttmála, sigur kona Nedved við eitt italskt blað.



*Fleyr beit bæði hart og væl frá sær, tá teir sunnudagin vunnu tryggan 3-0 sigur á SÍ*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Fleyr blandar seg

**Sørvingar fingu av at vita, tá teir vitjaðu í Havn um vikuskiftið**

FLOGBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Undan sunnudegnum vóru flogbóltsharrarnir hjá SÍ als ikki til at steðga.

Hóast kappingin hjá monnum er heldur skeiklað, nú liðini í deildini eru somikið fá, so hevði SÍ fyrstu dystirnar prógvað, at teir eru liðið, sum hini mugu taka, um kappingin skal vinnast, so setningurin hjá Fleyr var greiður sunnudagin.

Og tað vísti seg eisini, at Fleyr væl og virðiliga livdi upp til kravið. Havnarmenninir hava styrkt um liðið í ár, og eitt nú er Jón Nielsen komin til felagið, eftir at hann annars als ikki spældi flogbólt við kappingarársbyrjan.

Hóast úrslitini ikki hava talað so øgiliga greitt, so hevur spælið hjá Fleyr støðugt verið á heilt góðari leið, og hesa ferð bragdaði eisini á talvuni, tá SÍ so ruddiliga varð sent heim við ongum. Fleyr læt sjáldan nakran iva vera um, hvar stigini skuldu fara, og sigurin prógvaði veruliga, at Fleyr skal teljast saman við ÍF og SÍ, tá heiðursmerkini skulu býtast í vár.

Hin dysturin var millum Mjølnir og ÍF, og her vunnu fuglfirðingarnir ein tryggan sigur, soleiðis at teir nú eru ájavnir við SÍ í oddinum.

## Úrslitini

**Eik-ligan, kvinnur**

| | |
|---|---|
| SÍ-TB | 3-0 (25-18, 25-22, 25-21) |
| Dráttur-Fleyr | 3-1 |
| Mjølnir-KÍF | 3-2 (21-25, 25-15, 21-25, 25-16, 15-6) |
| Dráttur-SÍ | 2-3 (21-25, 23-25, 25-14, 25-22, 12-15) |
| Mjølnir-TB | 3-0 (25-12, 25-17, 25-23) |

**Eik-ligan, menn**

| | |
|---|---|
| Mjølnir-ÍF | 0-3 (18-25, 17-25, 19-25) |
| Fleyr-SÍ | 3-0 (25-16, 25-15, 25-20) |

## Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 SÍ | 11 | 11 | - | 0 | 33 | 13 | 20 | 22 |
| 2 Mjølnir | 10 | 6 | - | 4 | 22 | 15 | 7 | 12 |
| 3 Fleyr | 10 | 6 | - | 4 | 21 | 16 | 5 | 12 |
| 4 Dráttur | 10 | 6 | - | 4 | 22 | 18 | 4 | 12 |
| 5 ÍF | 9 | 5 | - | 4 | 19 | 13 | 6 | 10 |
| 6 KÍF | 10 | 1 | - | 9 | 13 | 27 | -14 | 2 |
| 7 TB | 10 | 0 | - | 10 | 2 | 30 | -28 | 0 |

**Eik-ligan, menn**

| | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 5 | 4 | - | 1 | 14 | 4 | 10 | 8 |
| 2 SÍ | 5 | 4 | - | 1 | 12 | 7 | 5 | 8 |
| 3 Fleyr | 5 | 2 | - | 3 | 7 | 10 | -3 | 4 |
| 4 Mjølnir | 5 | 0 | - | 5 | 3 | 15 | -12 | 0 |

## Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 9 | 8 | - | 0 | - | 1 | 257 | 191 | 66 | 16 |
| 2 Stjørnan | 9 | 7 | - | 1 | - | 1 | 255 | 185 | 70 | 15 |
| 3 Tjaldur | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 235 | 217 | 18 | 10 |
| 4 Neistin | 9 | 3 | - | 3 | - | 3 | 222 | 218 | 4 | 9 |
| 5 StÍF | 9 | 2 | - | 0 | - | 7 | 205 | 264 | -59 | 4 |
| 6 Kyndil | 9 | 0 | - | 0 | - | 9 | 155 | 254 | -99 | 0 |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 8 | 7 | - | 0 | - | 1 | 216 | 192 | 24 | 14 |
| 2 Neistin | 8 | 6 | - | 0 | - | 2 | 243 | 226 | 17 | 12 |
| 3 H71 | 8 | 5 | - | 0 | - | 3 | 210 | 187 | 23 | 10 |
| 4 StÍF | 8 | 3 | - | 2 | - | 3 | 188 | 189 | -1 | 8 |
| 5 KÍF | 8 | 1 | - | 0 | - | 7 | 186 | 215 | -29 | 2 |
| 6 Kyndil | 8 | 0 | - | 2 | - | 6 | 187 | 221 | -34 | 2 |

